**Sørvágs kommuna**
**FR-380 Sørvágur · Føroyar**

Tlf. 32004 - 33122
Telefax 009 298 32952

Sørvágur 29.12.93

**Kunningarskriv frá Sørvágs bygdaráð**

Vit eru í ferð við at runda tað fyrsta árið hjá sitandi bygdaráði, og hvussu skurðurin hevur vignast, verður upp til hvønn einstaka borgaran sjálvan at meta um, men hóast hvør borgari ger upp við seg sjálvan, fara vit sum lovað at senda út eitt skriv, sum greiðir eitt sindur frá bygdaráðsarbeiðinum.

Bygdaráðið hevur havt 22 fundir í farna árinum og viðgjørt gott og væl 100 mál: sáttmálar - skattamál - matr. sundurbýti - og kanska serliga umsóknir av ymiskum slag o.a.

Eitthvørt bygdaráð byggir á herðarnar á tí undanfarna, og av málum vit hava "arva" eru m.a. flyting av bókasavninum og stovnsetan av barna-garði. Viðvíkjandi bókasavninum er at siga, at bygdaráðið samtykti í summar at flyta bókasavnið, og er hetta mál nú endaliga avgreitt, soleiðis at nýggja bókasavnið nú er í glasgongini millum báðar skúlarnar við inngongd úr skúlagarðinum, og bókavørður er Turid Sørensen.

Viðvíkjandi stovnsetan av barnagarði er at siga, at undanfarna bygdaráð samtykti hetta mál, og tað hevur hetta bygdaráðið eisini gjørt. Arbeiðið hjá okkum hevur verið at fingið fígging, og tá vit ikki fingu vanliga fígging, undir treytum vit kundu góðtaka, hevur tað eydnast okkum við landstýrisloyvi at fáa til vega alternativa fígging, sum so avgjørt er kommununi til fyrimunar. Arbeiðið er farið í gongd, og eftir ætlan verður klárt at flyta inn fyrst í komandi ári. Leiðari á stovninum er Elsa Margit Davidsen, og tað verður hon saman við nevndini, sum fer at seta tey starvsfólk, íð brúk verður fyri. Barnagarðsnevndin er soleiðis samansett:

Jógvan á Ørg, formaður
Sólva Thomassen
Jastrid Hansen
Jákup á Stongum
Poul Arni Jacobsen

Hesir báðir seinast nevndu verða skiftir út við tvey foreldraumboð, tá barnagarðurin letur upp.

Eitt tungt men neyðugt stig hjá bygdaráðnum hevur verið uppsagnir av fólki. Nøkur fólk eru hetta árið søgd úr starvi vegna eftir-lønaraldur, meðan onnur eru uppsøgd vegna sparingar/ umleggingar.

Truplar tíðir standa fyri framman var sagt í tí seinasta tíðinda-skrivinum, og tað má ásannast, nú eitt ár er runnið, at so hevur verið, og her verður serstakliga hugsað um fíggjarstøðu okkara.

Sambært upplýsingum frá Toll- og Skattstovu Føroya er skattskylduga inntøkan fyri 1994 mett til kr. 68 mill., mótvegis kr. 85 mill. í 1993. Broytingin, -20 % , stavar frá minkandi virksemi og tí harav alsamt vaksandi arbeiðsloysinum, sum sambært seinastu uppgerð umfatar 108 fólk, ella 20 % av aldursbólkinum 16 - 66 ár.

Her kann skoytast uppí, at Sørvágs kommuna hevur í desembur havt 10 ungfólk millum 16 og 26 ár í arbeiði. Hetta hevur latið seg gjørt, tí vit fingu part í játtanini til "Ung í arbeiði" (u.l. 90.000 kr) frá Føroya Landsstýri. Teirra arbeiði hevur m.a. verið norðuri á dumpinum, sum vit nú eru í ferð við at tyrva, - við húsini við Gil, og so hava tey gjørt eina gøtu frá skúlanum oman á vegin millum kirkjuna og húsini hjá Lydiu.

Higartil hevur Sørvágs kommuna megnað at svara hvørjum sítt, og orsøkin til at vit hava kláráð at svara skyldur okkara er m.a.: hækking av skattaprosenti, umfíggingar og skerjingar í raksturi, men sum útlitini eru, so er nógv, sum talar fyri, at vit ikki framhaldandi verða førir fyri at halda skyldur okkara mótvegis m.a. lánistovnum, tí størsti trupulleikin í dag er fallandi inntøka, herumframt er tann parturin av útreiðslunum, sum kommunan kann ávirka, minkaður munandi, samstundis sum rentir og avdráttir og lógarbundnar útreiðslur eru øktar.

Størsti parturin av kommunalu rakstrarútreiðslunum eru lógarbundnar og/ella fastar. Fyri 1994 verða hesar útreiðslur í prosentum í mun til skattainntøkuna:

| | | |
|---|---|---|
| Almanna og heilsumál | 18% | |
| skúlamál | 16% | |
| Renovatión - landsvegagjald o.a. | 13% | |
| Samanlagt | | 47% |
| Rentir | 36% | |
| | | 83% |
| Til rakstur og avdráttir | 17% | |

Ásetan av skattaprosenti er avgerandi fyri inntøkuna hjá kommununi! Sambært lóg frá Føroya Løgtingi var skattaprosentið hjá føroysku kommununum læst fast millum 16 og 23%, og harav skulu allar kommunur seta 1% í ein kommunalan lánigrunn, sum verður settur á stovn fyri at hjálpa teimum kommununum, sum eru illa fyri fíggjarliga. Á bygdaráðsfundi 16.12.93 var samtykt at skattaprosentið í Sørvági verður:

| | 1994 | 1993 |
|---|---|---|
| Skattskyldug inntøka: | 68.000.000 mill. | 85.000.000 mill. |
| Skattaprosent | 22% + 1% (23%) | 23,5% |
| Barnafrádráttur | 2500 kr. | 2500 kr. |
| Kirkjuskattur | 0,1% | 0,1% |

Ætlanin vísir eitt avlop áðrenn rentir og avdráttir á kr. 4,3 mill. Rentir og avdráttir við verandi lánum eru 6,6 mill., og hallið eftir rentir og avdráttir sostatt 2,3 mill., og okkara partur til kommunala lánsgrunnin er kr. 528.213.

Fyri at fáa fíggjarætlanina fyri 1994 at hanga saman, sær kommunan einasta møguleika verða at lækka rentu og avdráttarbyrðuna á ein hátt, har allir eru líkastillaðir. Ávísur peningastovnur hevur ynskt transport í skattainntøku, svarandi til rentir og avdráttir, men kommunan hevur noktað hesum, við teirri grundgeving, at hon ikki er sinnað, at geva einum lánistovni framíhjárætt.

Í 1993 hevur Sørvágs kommuna umlagt allar rakstrarkredittir til lán, og verður samlaða netto lánskuldin við árslok uml. 35.0 mill. býtt soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Bankar og Sparikassi | (FR) | 9,4 mill. |
| Tryggingar | (FR) | 9,6 mill. |
| Nykredit | (DK) | 15,9 mill. |
| Kommunukredit | (DK) | 0,1 mill. |

Av hesum sæst at skuld okkara stendur í stað í mun til síðsta ár, og kemmur hetta av umleggingunum av rakstrarkredittunum + at kommunan hevur fingið álagt eitt veðhaldslán uppá u.l. 1,5 mill. vegna fiskivinnuna.

Kommunan hevur havt fyrispurning hjá Nykredit um umfígging av lánum, men svaraðu teir, at tað við verandi umfíggingarhátti ikki er til kommununar fyrimun. Lánini hjá Nykredit eru renta við u.l. 9,7% p.a. (írokn. prov.), resttíð er 23 ár.

Í skrivi seinnu helvt í nov. 1993 til føroysku lánveitararnar - (saman við fíggjarætlanini fyri 1994) vísir Sørvágs kommuna á, at um teir lækka rentuna til 6% p.a. og longja avdráttartíðina til 20 ár, so fæst fíggjarætlanin at javnviga. Verða lánini umløgd, merkir hetta at rentu- og avdráttir í 1994 broytast við samanlagt u.l. 2,3 mill. til 3,8 mill., svarandi til tað kommunan væntandi verður før fyri at gjalda.

Í skrivandi løtu er svar komið frá:

Føroya Vanlukkutrygging - Sjóvátrygging - Lívstrygging:
Samtykt ikki at ganga umsókn tykkara á møti.

Sjóvinnubankin: Umsóknin móttikin til viðgerðar.

Føroya Banki: Arbeitt verður við at finna eina loysn fyri allar kommunurnar, tá íð henda loysn fyriliggur skal kommunan hoyra frá okkum.

Sum sæst av hesum reglum, eru útlitini ikki av teimum bestu, men vónin má ikki sleppast, og tað er at gleðast yvir, at Sørvágs Arbeiðarafelag stríðist fyri, at fáa á stovn ein grunn til arbeiðsskapandi tiltøk, sum so væntandi kann seta okkurt í gongd, men hetta frætta tit nærri um frá teimum.

Til seinast skal ljóða ein heilsan til alt bygdafólkið, um eitt gott og eydnuberandi nýggjár, í vónini um at tað fer at ganga móti betri tíðum fyri okkum øll á bæði ein og annan hátt.

**SØRVÁGS KOMMUNA**

Petur Kruse formaður